AGANEVNDIN

KÆRA 5/2012

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: FF GIZA/FC Hoyvík kærir 07Vestur fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 28.04.2012 | Aganevndin móttikið kæru: 4. mai 2012 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

FF Giza/FC Hoyvík hevur kært 07Vestur fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum FF Giza/FC Hoyvík og 07Vestur tann 28. apríl 2012 í 2. deild menn.

Í kæruni vísir FF Giza/FC Hoyvík á, at 07Vestur hevur nýtt ein ólógligan leikara í dystinum tann 28. apríl 2012 og at talan er um leikaran Sonni Zachariasen, sum hevur spæliloyvið hjá SÍ.

07Vestur er hoyrt í málinum og takkar FF Giza/FC Hoyvík fyri dystin og ynskir tillukku við sigrinum.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 3. Fakta í málinum

Tann 28. apríl 2012 varð dystur leiktur millum FF Giza/FC Hoyvík og 07Vestur í 2. deild menn.

Í dystinum leikti Sonni Zachariasen fyri 07Vestur hóast leikarin tann 28. apríl 2012 var skrásettur hjá SÍ sambært leikaraskrá FSF's.

## 4. Lógarverkið

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

## 5. Staðfestingar, metingar, o.t.

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki. Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað.

Aganevndin hevur staðfest bæði í kærumáli 12/2010 og 13/2011, at ongir linnar verða givnir frá

kravinum í grein 15 í Kappingarreglunum fyri fótbólt um vantandi rætta skráseting av leikarum hjá samanløgdum feløgum.

Aganevndin staðfestir, at leikarin Sonni Zachariasen, sum leikti fyri 07Vestur í nevnda dysti, ikki var skrásettur sum lógligur leikari hjá 07Vestur.

**6. Niðurstøða**

Leikarin Sonni Zachariasen leikti ólógliga í dystinum millum FF Giza/FC Hoyvík og 07Vestur tann 28. apríl 2012 í 2. deild menn, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður 07Vestur 2. deild menn dømt at tapa dystin móti FF Giza/FC Hoyvík tann 28. apríl 2012 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 7. mai 2012**

Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna